# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óvanligt verjusamstarv

Ísland hevur júst gjørt avtalu við Noreg um verjustamstarv. Hetta er eitt framhald av aðrari avtalu við Danmark um herflotasamstarv. Hesar avtalur eru sera áhugaverdar. Tað var tann tíð, tá ið øll Norðurlond í ramasta álvara samráddust um eina norðurlendska verjusamgongu. Hesar samsráðingar endaðu úrslitaleysar eitt nú tí, at Noreg vildi hava Bretland upp í eina møguliga norðurlendska verjusamgongu, men hetta kundu onnur lond t.d. Svøríki als ikki góðtaka, og tí valdu Noreg, Danmark og Ísland at fara upp í NATO.

Tá Ísland fór upp í NATO, tók USA ábyrgdina av íslendsku verjuni og hevur havt hesa ábyrgd, til USA herfyri tók seg av herstøðini í Keflavík. Nú hevur Ísland so gjørt av at gera avtalu við Danmark um herflotasamstarv og við Noreg um loftverjusamstarv. Uttan at kenna avtaluna í smálutum tykist hon vera til stóran fyrimun fyri allar partar. Danmark sleppur at nýta íslendskar havnir til síni herskip, og Noreg sleppur at nýta Keflavíkar flogstøðina til síni hernaðarflogfør. Báðar tjóðir Danmark og Noreg hava tørv á hesum til tess at tryggja eftorlitið við yvirvøldum sínum í Norðurhøvum. Ísland fær so hinvegin eina ávísa verjutrygd, men hvat hetta í roynd og veru merkir, vita vit ikki enn.

Samstarvið er sera áhugavert eisini sæð frá føroyskari síðu. Tað vísir, at alt gamalt agg er lagt til vigs og at londini eru til reiðar at ganga ótradtitonellar leiðir. Støðan er jú grundleggjandi broytt og hetta krevur, at londini fara at hugsa trygd og verju í nýggjum breytum. Fyri okkum er hetta sera áhugavert. Hetta merkir, at vit sum spakuliga eru at veg móti fullum sjálvstýri, saktans kunnu samráða okkum til eina nøktandi trygdarskipan, um vit droppa út úr ríkinum og ikki ynskja at vera verðandi undir veingjabreiði NATOs. Hesar avtalur geva eisini eitt nýtt perspktiv til norðurlendskt samstarv. Slíkar avtalur hvødu verið óhugsandi fyri fall múrsins og endan á kalda krígnum. Hetta vísir, hvussu nógv heimur er broyttur, og er tað sjálvsag neyðugt at sipa seg hareftir.

**Sosialurin**

# Norðoyatunnilin eitt ár og hvat so?

**ANSKAR HANSEN**
Klaksvík



Vit keypa tunnilin og fíggja Kl. sjúkrahús!

Uppskot 1: Eitt samtak yvirtekur tunnilin frá P/f Norðoyatunnilin fyri áljóðandi tað lán sum avtalað er, vit skulu gjalda aftur til landskassan.

Síðani handa vit tunnilin til landskassan, ímóti at vit fáa loyvi at krevja inn bummgjald í eitt ávíst áramál.

Tá nú tunnilin er latin til landskassan, liggur tað sjálvandi í tí, at teir hava allan raksturin av tunnlinum, meðan vit hava bert innkrevjingina eftir.

Innkrevjingin skal standardiserast og automatiserst munandi.

Tá nú raksturin er allur farin úr prísásetingini og munandi sparingar eru gjørdar á umsitingini skuldi veri lætt at sæð, at prísurin fyri at koyra verður munandi lægri enn í dag.

Tað kann gerast við t. d. at allar støddir av kubba kosta eins og tú kann velja frá trimum til hundrað túrar, og at øll sum koyra ígjøgnum tunnilin skulu nýta kubba, eisini útlenskir bilar.

Avgreiðslan av kubbunum fer fram á bensinsølunum, og sjálvt bókhaldið verður munandi automatiserað, t. v.s. at tá tú fær eitt grønt ljós, so er tú automatiskt fult bókaður.

Tømist kubbin, so skal vera automatisk ljóskipan við skeltum sum boða tær frá í stórum, at t. d. nú eru bert tveir túrar eftir á kubbanum. Hendan ljósskeltingin skal vera so mikið stórsligin, at tú ikki kann umgangast at fáa við, at nú mást tú inn á eina bensinstøð at fylla á aftur, gert tú ikki tað ella koyrir uttan at hava goldið skal bótin vera so stór at tað veruliga merkist, og harvið er sjálváminnandi, eitt nú hevur Eysturríki bótina fyri at koyra har við tómum kubba, 3000 kr - eisini fyri útlendingar, so hví skal tað vera frítt og rokna sum gestablidni, at útlendingar koyra uttan at gjalda í Føroyum?

Og hví skal tað kosta milliónir at umsita tunnilin í dag, tá hugsað verður um, at í London sentrum hava tey eitt avgjald fyri at koyra inn har. Har koyra um hálv millión bilar hvønn dag, og alt verður stýrt við teldum - bæði skrásetingin og rokningin, so tað mátti einsini kunna borið til í Føroyum.

Mín meting er við oman fyri standandi broytingum skuldi kunna borið til at fyri tað fyrsta havt eitt munandi lægri gjald umframt at kunna goldið alt lánið aftur eftir umleið 7-8 árum.

Uppskot 2: Tá landskassin soleiðis fær so stóra upphædd inngoldna í einum heilt ekstraordinert, ja, so hava teir til alla fíggjingina til útbyggingina av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum arbeiðsbólkurin ráddi til nú um dagarnar.

# Speki - stóran áhuga millum hyggjarar

**SJÓNVARP**
*Tíðindaskriv*

Hesar seinastu mánaðirnar hevur ein sending verið á skránni mikuvøld, ið nevnist Speki. Talan er um upptøkur av fyrilestrum, ið vísindastarvsfólk á Fróðskaparsetrinum og øðrum granskingarstovnum, hava hildið. Tað er greitt, at fólk eru ymisk á máli um góðskuna á sendingunum, og tað hevur serliga at gera við, hvussu væl vísindastarvsfólkini duga at føra seg fram á sjónvarpsskíggjanum. Her er støðan í løtuni, at summi duga sera væl, meðan onnur tykjast meiri óvon við miðilin.

Summar sendingar hava ikki verið so sjónvarpsvinarligar, meðan aðrar hava verið stak góðar. Eisini vísa hyggjaratøl, ið Fróðskaparsetrið hevur fingið frá Kringvarpinum, at umleið 19% av føroyingum - ella næstan 7.000 fólk - hyggja eftir Speki. Uppaftur meiri áhugavert er, at av hesum eru fleiri enn 95%, ið hyggja eftir allari sendingini á tamb.

Sostatt má niðurstøðan vera, at Speki er ein sending, ið hevur stóran áhuga hjá einum relativt stórum hyggjaraskara. At næstan 7.000 føroyingar hyggja eftir Speki verður av Fróðskaparsetrinum mett sum ein sukse. Saman við royndunum frá "Setrið á Ferð" er tað tí eyðsýnt, at vísindatilfar hevur áhuga millum nógv fólk. Tí fara tað eisini at verða tiknir nýggir fyrilestrar upp í mai, ið verða sendir í heyst.

Hóast móttøkan sum heild hevur verið góð, so eru tað tó ting, ið skulu betrast. Rætt er, at einstakir av fyrilestrunum hava verið ov "útvarpsligir" og ov lítið "sjónvarpsligir". Hetta er tikið til eftirtektar. Saman við Kringvarpinum verður arbeitt við at skapa eina siðvenju um, hvussu góðir sjónvarpsfyrilestrar verða hildnir.

Ikki er ætlanin at broyta konseptið, men hinvegin at veita fyrilestrarhaldarunum nøkur amboð til at framføra á einum sjónvarpsskíggja. Tað er Kringvarpið, ið hevur serførleikan á hesum økinum, og tí er tað Kringvarpsins lutur at vera við til at tryggja eina positiva menning av Speki.

Innihaldið er gott, men formurin kann gerast betri, siga Fróðskaparsetur Føroya og Kringvarp Føroya í tíðindaskrivi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rǽttuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.